# Atlantsflog einsamalt á páskum

**Leiðslan í danska flogfelagnum DAT hevur gjørt av, at felagið fer ikki at flúgva til Føroya á páskum, sum felagið annars fyr hevur boðað frá**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*




*Flogævintýrið hjá danska flogfelagnum Danish Air Transport á Føroyarutuni, er av fyri hesaferð. Endalig avgerð um framhaldandi flúgving verður tikin einaferð seint í vár*
Mynd: Jens Kristian Vang

Flogførini hjá Danish Air Transport fara ikki at lenda í Vágum um páskirnar. Tað hevur felagið gjørt av eftir at hava eftirmett flúgvingina um jólini.

Felagið sigur í tíðindskrivi, at tey vóru nøgd við undirtøkuna á jólum, men óvissan um, hvussu verður, um veðurlíkindini ikki eru nóg góð, ger at gjørt er av ikki at flúgva á páskum.

Sum skilst á leiðsluni í DAT, eru tey ikki sannførd um, at flogførini hjá felagnum eru tey røttu at flúgva til Føroya við. DAT hevur bara propelflogfør, sum flúgva nakað væl seinni enn jetflogførini, ið Atlantsflog hevur.

Sagt verður, at felagið nú fer at kanna, um møguleiki er fyri at finna onnur flogfør, áðrenn endaliga verður gjørt av, um felagið yvirhøvur fer at royna Føroyaflúgvingina aftur.

Sagt verður í tíðindaskrivinum, at endaliga avgerðin, um roynt verður at flúgva aftur, verður ikki tikin fyrr enn einaferð seint í vár.


TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Løgfrøðingur

**Søkt verður eftir løgfrøðingi til nýtt starv í løgfrøðisligum spurningum á stjórnarskrivstovuni.**

Høvuðsarbeiðsøkið er at ráðgeva politikarum, stjórum og starvsfólkum kommununnar og at vera við til at menna mannagongdir kommununnar. Harafturar kemur málsviðgerð og samskifti, t.d. við borgarar, virki og myndugleikar, í málum, ið eru latin stjórnarskrivstovuni at avgreiða serskilt ella í samráð við onnur.

Starvið, kommunan bjóðar, er í einum spennandi og dynamiskum umhvørvi, við sjálvstøðugum, avbjóðandi og tvørfakligum uppgávum, ið geva tær møguleika fyri stórari fakligari og persónligari menning.

**Setunartreytir**
Neyðugt er at umsøkjarin hevur løgfrøðisligt embætisprógv, og dentur verður lagdur á relevantar royndir og helst innan almenna fyrisiting. Neyðugt er at duga væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis.

Starvið verður sett skjótast til ber og lønt sambært sáttmálanum millum BLF og Fíggjarmálaráðið. Møguleiki er at verða settur sum ráðgevi, um førleikin og royndirnar eru til tess.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jens Marius Poulsen, kommunustjóra, ella Heðin Mortensen, borgarstjóra, tlf. 30 20 10.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 11. februar 2004. Viðmerk á umsóknina "løgfrøðingur".

**Stjórnarskrivstovan**

Stjórnarskrivstovan heldur, saman við stjórunum, mentamáladeildini og starvsfólkadeildini, til í Ráðhúsinum á Vaglinum.

Stjórnarskrivstovan, har í løtuni 4 fólk starvast, er felagsskrivstovan hjá borgarstjóranum og hinum stjórum kommununnar.

Stjórnarskrivstovan tekur sær av nøgvum ymiskum uppgávum, m.a. planlegging, samskifti, málsviðgerð og ráðgeving.

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo






## Skrá fyri báðar dagarnar

**Mikudagin 26. januar á miðnámsskúlunum á Kambsdali og Hósdagin 27. januar á studentaskúlanum í Hoydølum**

Allan dagin (8.30 - 15.30) verða básar við internet-atgongd, har bæði einstaklingar og bólkar kunnu fáa vegleiðing.

Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri, setur stevnuna á Kambsdali, mikudagin 26. januar klokkan 8.15.
Jacob Lange, stjóri á KOT í Danmark, setur stevnuna í Hoydølum, hósdagin 27. januar klokkan 8.15.

| Høli 1 | Klokkan | Høli 2 |
|---|---|---|
| Fróðskaparsetur Føroya - www.setur.fo | 8.30 | Týskland - Frank Rössel - www.goethe.de |
| Stóra Bretland - Jacqueline Guerrier - www.britishcouncil.dk | 8.50 | Sjómans-/Maskinmeistaraskúlin - www.farnav.fo |
| REJSEBOGEN - Georg Harmsen - www.rejsebogen.dk | 9.10 | Finland - Kristina Marisalo - www.cimo.fi |
| Meginfelag Føroyskra Studenta - www.mfs.fo | 9.30 | Ísland - Aslaug Jónsdóttir - www.ask.hi.is |
| Danmark - Jakob Lange - www.ug.dk | 9.50 | Tekniski Skúlin í Tórshavn - www.tst.fo |
| Study Abroad - Peter Bosteen - www.studyabroad.dk | 10.10 | Svøríki - Sussi Thuré - vistas.nu - www.studera.nu |
| Noreg - Karoline Tellum - www.aetat.no - www.utdanning.no | 10.30 | Føroya Handilsskúli - www.fh.fo |
| USA - Hedvig Gyde Thomsen - www.daf-fulb.dk | 10.50 | Frakland - Kirsten Madura - www.amba-france.dk |
| Avstralia - Palle Steen Jensen - www.edu-danmark.dk | 11.10 | Italia - Alessandra Sicuro - www.iic.dk |
| Føroya Sparikassi - www.sparikassin.fo | 11.30 | Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya - www.srfs.fo |

**Skrá fyri Parat til start 13.00-15.30 báðar dagarnar.** ***www.parattilstart.nu***

| | |
|---|---|
| kl. 13.00 | Framløga um framtíðar arbeiðsmarknaðin |
| kl. 13.50 | Steðgur |
| kl. 14.00 | Søkja starv og starvssamrøður |
| kl. 14.45 | Steðgur |
| kl. 14.55 | Globaliseringin |

**Ókeypis atgongd. Øll eru vælkomin!**
**Fá meira at vita á: www.ask.fo**

Stephanssons Hús